# Nósakapping á Tvøroyri

**Í allan dag verður stór fótbóltskapping fyri børn í ítróttarhøllini í Trongsivági. Liðini, sum vinna, fáa steyp frá Nósa**

BARNAKAPPING
*Áki Bertholdsen*

Í allan verður ítróttarhøllin í Trongisvági karmur um eina stóra fóltbóltskapping fyri børn.

Tilsamans hava 46 lið meldað til kappingina og tey koma úr øllum feløgunum í oynni, bæði úr Sumba, Vági, Tvøroyri og úr Hvalba.

Eitt lið norðaneftir hevði boðað frá luttøku, men tey settust aftur, tí veðurlíkindini eru so vánalig.

Kappast verður í fleiri aldursbólkum, heilt frá teimum minstu, upp til drongir.

Kappast verður í hesum bólkum: Minismápiltar, smápiltar, piltar, smágentur, smádrongir og drongir.

Sostatt verður ein ørgrynna av dystum í høllini leygardagin og tí verður lagt til brots longu frá morgunstundini. Kappingin byrjar klokkan 9 í morgun og heldur fram allan dagin og væntandi er ikki, at hon endar, fyrrenn klokkan 8 - 8.30 í kvøld.

Hvør dystur varar í fimm minuttir og liðini, sum vinna og verða nummar tvey og trý, fáa heiðursmerki frá Nósa.

Samstundis fær tann, sum avrikar okkurt serliga hegnisligt, tað kann vera eina góða fintu, eitt gott mál, ella okkurt annað snilt, eisini okkurt frá Nósa.

Hetta er aðru ferð, at TB skipar fyri innandura fótbóltskapping fyri tey smæstu og líkt er til, at hetta verður eitt afturvendandi tiltak um heysti.

Kappingin byrjar við kappingini hjá smágentunum, sum byrja klokkan 9 og tær eru lidnar kl. 9.50

Tá byrja minismápiltarnir, smápiltar byrja kl. 11.40, smádrongirnir kl. 14.30 og piltarnir kl. 16.30. og smádrongirnir kl. 18.10.

Teir ymsu aldursbólkarnir verða gjørdir lidnir so hvørt og heiðurstekin verða handað eftir hvørja kapping.

Og fyrireikararnir siga, at tíðarætlanin fer at halda.















# Í morgin verður Dimmalætting 125 ár

**Í morgin, tann 5. januar, eru liðin 125 ár síðani, at Dimmalætting alment kom út á fyrsta sinni**

BLAÐSØGA
*Eirikur Lindenskov*



*Hóast royndarprentið av Dimmalætting kom hin 8. desember í 1877, so kom fyrsta regluliga útgávan leygardagin hin 5. januar í 1878. Blaðið kom út eina ferð um vikuna, og tað kostaði 6 krónur um árið at halda blaðið. Á myndini sæst forsíðan á fyrstu regluligu Dimmuni, sum er til skjals á savninum á Sosialinum*

Dagurin í morgin, tann 5. januar, er ein rundur dagur í føroyskari blaðsøgu. Tá eru liðin 125 ár síðani at Føroya elsta núlivandi ávís, Dimmalætting, alment kom út á fyrsta sinni. Tó so kom eitt royndarprent av Dimmalætting út 8. desember í 1877 – men Dimmalætting nr. 1 árg. 1 kom út 5. januar 1878.

Menninir aftan fyri Dimmalætting tá vóru danskir embætismennin í Havn og aðrir borgarar. Millum føroyingarnar, ið við vóru, kunnu nevnast Jens Olsen, keypmaður í Havn og Enok Bærentsen, eisini keypmaður.

Tað sigst eisini, at V. U. Hammershaimb var við, tá stovandi aðalfundur var. Tað var eisini hann, sum kom við uppskotinum um hjánavnið, Dimmalætting. Annars var høvuðsnavnið Amtstidende for Færøerne. Í royndarprentinum frá 8. desember í 1977 skrivar V. U. Hammershaimb:

*»Færøerne eru ofte kaldet Taagernes Land, og i en vis Forstand kann dette vel siges; Landet, Befolkningen og dens institutioner have været forholdsvis ukjendte saavel for vore danske Landsmænd som for den Fremmede; nogen klar Forestilling om det Liv, der rører sig her, har man ikke havt, kun gjennem Afstandens Taage har man skimtet det. Maatte da nærværende Blad bidrage til at løfte dette Taageslør, maatte det som Morgendæmringen bebude den gryende Dag og derved med rette hævde sit symbolske Navn, "Dimmalætting".«*

Amtstidende for Færøerne hevur helst tykst føroyingum ov tungd sum navn, og skjótt varð blaðið nevnt Dimmalætting, ella Dimma. Blaðið hevði frá byrjan eitt fjølbroytt úrval av tilfari, eitt nú tíðindi úr Føroyum og uttan úr heimi, viðmerkingar, lesarabrøv, mentanartilfar, undirhald og lýsingar.

Frá byrjan var blaðið ein konservativ avís, sum í donskum politikki stuðlaði stjórnini, og sum ikki porentaði tilfar, ið kundi elva til rumbul og møguligar broytignar í valdsskipanini í Føroyum.

Tungt var tá at geva út bløð, og eftir umbøn frá blaðnum gjørdist blaðið frá 1. oktober 1879 alment kunngerðarblað - og fekk harvið allar almennar lýsingar og kunngerðir.

Fyrsti blaðstjórin á Dimmalætting var Lütje Lützen úr Havn. Løn hansara var 300 krónur um árið umframt seks prosent av vinningsbýtinum.

Blaðstjórar á Dimmalætting hava veri seinastu 125 árini:

Lütje Lützen 1878-80
O. P. Effersøe 1880-82 og 1892-93
Louis Berg 1882-83
H. C. Petersen 1885-86
R. C. Effersøe 1886-89
Jacob Johansen 1889-94
Enok Daniel Petersen 1894-00
S. E. Müller 1901-02
Chr. Heilskov 1902-03
Oluf Skaalum 1903-18
Poul Niclasen 1918-36
Georg Lindenskov Samuelsen 1936-81
Benny Lindensov Samuelsen 1981-95
Beate Lindenskov Samuelsen 1995-01
Georg Lindenskov Petersen 2001-2002
Ingi Lindenskov Sameulsen 2003-

Vit á Sosialinum ynskja Dimmalætting tillukku við degnum!

*(Kelda: Arnbjørn Ó. Dalsgarð »Føroysk blaðsøga 1852-2002«)*

# Clare úr sigling næstu seks vikurnar

**Norröna fer lutvíst at røkja farmasiglingina hjá Clare, meðan skipið fer niður á Frederikshavn Værft, har eitt tannhjul, sum er klovnað, skal umvælast**

FARMASIGLING
*Eirikur Lindenskov*



Clare var í dokk á Skála um jólini, og har vóru teir varugir við eitt tannhjul, ið er klovnað, og sum skal umvælast á Frederikshavn Værft. Tað er trupult at sleppa at skaðanum, og tryggingin hjá Clare krevur, at Frederikshavn Værft skal gera arbeiðið, tí danska skipasmiðjan hevur røttu útgerðina til umvælingina.

Tí fer Norröna lutvíst at røkja siglingina hjá Clare, sum orsakað av skaðanum verður úr sigling í einar seks vikur afturat. Norröna fer at sigla túrarnar hjá Clare til Lerwick við beinleiðis sambandi til Aberdeen. Siglt verður mánakvøld, og um tørvur er á at fáa farm til Danmarkar á hesum túrinum, heldur Norröna leiðina fram til Hanstholm og verður aftur í Havn hósdag, so hon sambært vanligu ferðaætlanina kann fara úr Tórshavn til Hanstholm hóskvøld.

Norröna er bundin av síni vetrarferðaætlan, og hon kann sostatt ikki yvirtaka allar túrarnar hjá Clare. Tí verður neyðugt at leggja partar av rutuni hjá Clare niður næstu seks vikurnar. Talan er um fríggjadagstúrarnar til Danmarkar og um allar túrar til Drelnes og Klaksvíkar.

Smyril Line vildi fegið funnið eitt annað skip til siglingina hjá Clare, men við stuttum skotbrái er tað sera kostnaðarmikið at leiga skip at røkja siglingina hjá Clare í einans seks vikur.

– Tá vit so hava í huga, at lítið er til av laksi, og at fiskiflotin liggur svínabundin orsakað av verkfallinum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum, er alt ov lítið grundarlag hjá Smyril Line at leiga eitt skip í seks vikur, sigur Heðin Joensen, sølu- og marknaðarleiðari á farmadeildini hjá Smyril Line.

FISKIVINNUSKÚLIN
Í VESTMANNA

Viðlíkahald av arbeiðsmegini

Leiðaraskapur - leiðsla & samstarv á fiskavirkjum og í alivinnuni

Tú kanst keypa arbeiðsmegina frá fólki, men tú kanst ikki keypa hjartað í fólki. Tað er í hjartanum, at eldhugi, ágrýtni og ídni eru. Tú kanst keypa arbeiðstíðina frá fólki, men tú kanst ikki keypa heilan hjá fólki. Tað er í heilanum, at skapanarevni, uppfinnsemi og virkishugur eru.

Leiðaraskapur er um, at tú skalt fara við arbeiðsmegini líka so væl sum við tínum bestu maskinum og tínum besta viðskiftafólki. Fært tú ikki starvsfólkið at virka, fært tú einki at virka.

Eingin leiðsla kann - uttan mun til, hvussu stóra framgongd hon hevur - setast í staðin fyri leiðaraskap. Leiðsla uttan munagóðan leiðaraskap, er sum at seta upp liggistólar á "Titanic".

Um tú vilt hava starvsfólkið til at virka og skapa eitt gott úrslit, mást tú arbeiða við at "persónliggera" virkið, og arbeiða við at menna leiðaraskapin hjá leiðaranum og samstarvsliga førleikan hjá bæði leiðara og starvsfólki.

Uppskriftin er sera einføld: Fólk, sum kenna seg sett uttan fyri ávirkan, svara aftur við at sleppa sær undan ábyrgd, meðan fólk, ið kenna seg sum ein part av virkinum, svara aftur við at taka ábyrgd. Restina kanst tú hoyra um á skeiðnum, sum vit skipa fyri.

**Málbólkur:** Virkisleiðarar, góðskuleiðarar, formenn, álitisfólk og stjórar á fiskavirkjum og í alivinnuni

**Tíð:** 18. og 19. januar 2003
**Stað:** á Hotel Føroyum
**Undirvísari:** Bergur Godtfred, sum seinastu árini m.a. hevur undirvíst og ráðgivið í leiðslu
**Skeiðskostnaður:** Kr. 4.500 við gisting og kr. 4.000 uttan gisting
**Tilmeldingarfreist:** Fríggjadagin 10. januar 2003

Tú kanst fáa meira at vita um skeiðið við at venda tær til Fiskivinnuskúlan,
tel. 222367 *, fax 424428, t-postur: lilian.isaksen@skulin.fo

FISKIVINNUSKÚLIN

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 22 23 67
fax 42 44 28
Teldupostur:
fiskvest@fiskvest.fo